# Gleði og tunglyndi úr Eysturoy

**Seinastu nøvnini á pallinum í NASA leygarkvøldið vóru Høgni Lisberg saman við bólki og Gestir, sum endaðu veitsluna.**

*Fróði Løksagarð*

Høgni Lisberg hevði frammanundan framførsluni í Reykjavík verið á einari minni konsertferð í Danmark, har hann vitjaði trýggjar bio-hallir, umframt at hann saman við bólki eisini framførdi í donsku sjónvarpssendingini Go' Morgen Danmark. Tískil var talan um ein bólk í góðari venjing, sum skuldu fylla skógvarnar eftir Eivør, sum fekk salin at kóka. Og júst glaði og melodiski tónleikurin hjá Høgna Lisberg var frálíkur til endamálið.



*Gestir eru ein bólkur, ið kann koma heilt langt*
*mynd: Gissur Patursson*

### Væl samansjóvaður bólkur

Afturat sær hevði Høgni sín eftirhondini fasta bólk. Hesin bólkur er mannaður við Brandi Jacobsen á trummum, Jens L Thomsen á bass, Hans Poulsen á tangentum og Allan Tausen á guitar. Bólkurin er væl samansjóvaður og ein fragd at hoyra.

Seinast eg hoyrdi Høgna á palli í Føroyum, var tá hann saman við bólkinum spældi á Summarfestivalinum í Klaksvík. Hetta er fyri meg ein minnilig konsert, sum eg haldi var framúr væleydnað, og tískil høvdu teir nógv at liva upp til.

### Við fullari ferð

Tónleikurin Høgni framførdi í Íslandi, var á leið tann sami sum var framførdur seinasta summar, tó við undantaki av tveimum nýggjum løgum, sum vit skulu venda aftur til. Teir løgdu út við lagnum Just Dig, og so koyrdi tað bara við fullari ferð. Seinna útgáva hansara, Morning Dew, myndaði í stóran mun konsertina. Íslendingar tóku væl ímóti løgum, sum Lela, Learn To Ride On Waves og Morning Dew, ið fleiri kendust við, eftir at Høgni hevur verið spældur í íslendskum útvarpi.

### Fangandi nýggj løg

Lagið Desert var eisini væleydnað, og serliga stuttligt var tað, tá allir tónleikararnir trokaðu seg saman fremst á pallinum. Sum nevnt so vóru tvey nýggj løg á skránni. Tað fyrra nevndist Birth Of Stars og tað seinna Been Out Of Town. Hesi bæði nýggju løgini vóru bæði fangandi, og eru partur av tilfari til eina komandi útgávu hjá Høgna, sum væntandi verður farið undir í næstum. Eftir konsertina høvdu Høgni og hansara menn alla grund til at fegnast, og vónandi kann konsertin seta enn meira ferð á hjá teimum í Íslandi.

### Trupult at umstilla seg

Gestir, sum lótu úr hondum eina av allar bestu føroysku útgávunum í fjør, fingu uppgávuna at enda kvøldið við føroyskum tónleiki. Tónleikurin hjá Gestir er filmiskur og til tíðir dapur, og als ikki í ætt við tónleikin hjá Høgna. Hetta gjørdi kanska, at fólk, sum vóru peppaði eftir framførsluna hjá Høgna, høvdu eitt sindur trupult at umstilla seg til meira krevjandi tónarnar frá Gestir. Eg freistist at halda, at Gestir høvdu komið meira til sín rætt fyrr um kvøldið.

### Tónleikurin talaði

Framførslan hjá Gestir var kortini góð. Teir høvdu styrkt um manningina við tveimum strúkarum, og hetta stuðlaði óføra væl undir tónleikin hjá teimum. Ljóðmyndin var væl útfylt. Løgini, teir framførdu, vóru tey vit kenna frá útgávuni Burtur frá toftunum. Persónliga dámdi mær best løgini, Mitt í verðini og Úr undirgrundini. Gestir eru ikki teir sum samskifta mest við lurtararan, sum tangentleikarin Knút eisini gjørdi vart við. Hetta gevur stundum lurtaranum eina kenslu at vera sleptir uppá fjall. Mær hevði dámt væl, um teir gjørdu eitt sindur meira við samskiftið, men møguliga vilja teir heldur lata tónleikin tala.

### Stórir møguleikar

Gestir vóru eitt sindur óheppnir við ljóðinum orsaka av væntandi ljóðroynd. Úrslitið var, at trupulleikar vóru við feedback í støðum, og hetta var órógvandi fyri áhoyrararnar. Limirnir í Gestir hava ikki spælt nógv saman, tað sum er farið av hesum árinum. Ein trupulleiki er, at teir eru búsitandi í fleiri londum, og hetta avmarkar møguleikarnar hjá teimum at venja saman. Men nú, bólkurin hevur fingið umboðssáttmála, er hugsandi, at oftari verður boð eftir teimum. Gestir er ein bólkur við stórum møguleikum. Um teir tora burturav at brúka tíð uppá tónleikin, ivist eg ikki í at teir kunnu náa langt. Takk fyri løtuna!

# Eivør einaferð enn

**Stóra stjørnan í Reykjavíkleygarkvøldið var ikki heilt óvæntað Eivør Pálsdóttir.**

*Fróði Løksagarð*

Eivør hevur serlig sambond til íslands, og íslendingar í øllum aldri hava veruliga tikið tónleikin hjá henni til sín. Tiskil er kanska ikki neyðugt hjá Eivør at luttaka á einum tiltaki, sum AME-Reykjavík, fyri at gera vart við sín tónleik. Hinvegin so var hon við til at selja fleiri atgongumerkir, soleiðis at íslendingar eisini fingu høvið at kunna seg við restina av føroyska tónleikinum, ið varð umboðaður.

### Góðir tónleikarar

At hjálpa sær leygarkvøldið hevði Eivør svenska guitarleikaran Gustaf Ljunggren, umframt føroysku tónleikaranar, Magnus Johannesen á tangentum, Rógva á Rógvu á trummum, Edvard Nyholm Debess, sum spældi bass og Unn Patursson, sum sang kór. Bólkurin við royndu tónleikarunum var ógvuliga væl leikandi, og legði botn undir frálíku framførsluna hjá Eivør.

### Framúrskarandi songrødd

Eivør spældi nýggjari og eldri tilfar, bæði hjá sær sjálvum og hjá Hanusi G. Johansen. Eivør legði út við frálíka lagnum, Mín móðir, og longu í fyrsta lagnum vísti hon síni framúrskarandi evnir sum sangari. Mær rennu til hugs orðini hjá einum kenningi, sum undan konsertini segði, at bara Eivør opnaði munnin, so ávirkaði tað hana reint kropsliga, hon fekk gásarhúð hvørja ferð Eivør sang.

### Spennandi nýtt

Eivør, sum ikki hevur spælt so nógv alment í seinastuni, hevur verið í upptøkuhølunum, har hon er júst er liðug við upptøkurnar til eina nýggja fløgu. Av tí sama hevði hon eisini nýtt tilfar við í framførsluni. Um eg hoyrdi rætt, nevndist tað eina lagið Livandi Trøll. Eitt lívligt og fríkst lag, sum gevur ábendingar um, at komandi útgávan hjá Eivør eisini kann gerast rættuliga spennandi. Sum áður nevnt slapp Hanus eisini upp í part, tá Eivør framførdi lagið Átjan, ið Hanus hevur gjørt til yrkingina hjá Tummas Napoleon Djurhuus. Hetta lagið fekk eisini rættuliga góða móttøku. Eivør framførdi eisini løgini Grát Ei og Where Are The Angels. Eivør endaði sína framførslu við einari ótrúligari útgávu av lagnum, Nú brennur tú í mær.

Rómurin í salinum mundi ongan enda fingið tá seinasta lagið hjá Eivør tónaði út, og hon fekk sum einasti luttakarin hetta kvøldið standandi viðurkenning frá øllum salinum.